# Vestmanna Kvøldskúli
Veturin 2023/2024

## Lærugrein

**1. Føroyskt fyri útlendingar** **hósdagar**
Undirvísari: Durita Danielsen

**2. Sangkór** **týsdag kl. 19.30**
Undirvísari og kórleiðari: Rannvá Matras-Olsen

**3. Fimleikur – móðir/barn** **týsdag kl. 16.30**
**4. Fimleikur – móðir/barn** **hósdag kl. 16.30**
Rørsluvenjingar í fimleikahøllini og svimjitilvenjing í hylinum. Aldur á barni: 3-7 ár.
Undirvísari: Sarita Eriksen

**5. Pilates-kvinnur** **kl. 18.00**
Mánadag og mikudag, í 8 vikur aftan á jól.
Pilatesvenjingar gera m.a. at tú fært ein smidigari kropp, sterkari búk- og ryggvøddar.
Undirvísari : Angelie Jógvansdóttir

**6. Seyming** **4 vikuskiftir**
Fríggjad. kl. 16:30-20:30 og leygard. kl. 09:00-15:00
20. & 21. okt., 03. & 04. nov., 16. & 17. febr. og 22. & 23. mars.
Kom á eitt spennandi skeið, har tú fert at endurnýta, endurnýggja og skapa títt egna snið. Sjálvandi kanst tú eisini seyma burtur úr nýggjum.
Ístaðin fyri at koyra burtur, kanst tú endurnýta pløgg til ymiskt, eitt nú pútu, tasku, pung, niðurdeil ella blusu.
Skeiðið er fyri øll, bæði roynd og óroynd.
Undirvísari : Fríðgerð Ovadóttir

**7. Handarbeiði** **hósdag kl. 19:00**
Lær at brodera, m.a. til føroyska búnan.
Undirvísarar: Sarita Funn og Harriet Olsen

## Lærugrein

**8. Frálæra í bridge, byrjarar** **eftir avtalu**
Undirvísarar: Eyðun Joensen og Laila Nikolajsen

**9. Skjúrt til føroysk klæði** **25 t. í apríl**
Kunnleiki til grundleggjandi seyming krevst, og bert eitt skjúrt verður sniðgivið og seymað.
Undirvísari: Tóra Tórgarð

**10. Vestur til føroysk klæði** **40 t. Í apríl**
Kunnleiki til grundleggjandi seyming krevst, og bert ein liðugt broderaður vestur verður sniðgivin og seymaður.
Undirvísari: Tóra Tórgarð

**11. Ymiskt úr glasi** **eftir avtalu**
Lær at evna ymiskt úr glasi.
Undirvísari: Ioana Rapa

**12. Matskeið fyri 2 ættarlið** **eftir avtalu**
Undirvíst verður 3 ferðir fyri jól og 3 ferðir eftir jól.
Lær at gera ymiskan døgurðamat og annað gott.
Skeiðið er ætlað 1 vaksnum saman við einum barni frá 7 ára aldri.
Undirvísari: Ioana Rapa

**13. Koyrikort til lítið prutl** **byrjar í viku 42**
Undirvíst verður í viku 42 og 43 í ástøði. Koyrifrálæra verður eftir viku 43. Byrjað verður týskvøldið 17. okt. kl. 17.00. Frálæra: 15 skúlatímar í ástøði. 12 skúlatímar í verkligari koyrifrálæru. 1.hjálparskeið í ferðsluni.
Treytin fyri at luttaka á skeiðnum er, at tú ert fyltur 15 ár áðrenn 1. nov. 2023. Somuleiðis hevur lógligt prutl og hjálm.
Kostnaðurin fyri koyrikort til prutl er 1.450 kr.
Undirvísari: Oluf Müller

## Børn í skúlaaldri

**14. Barnakór** **hósdag kl. 13:30 – 14.30**
Fyri børn í skúlaaldri
Undirvísari og kórleiðari: Rannvá Matras-Olsen

**15. Handaligt ítriv** **mikudag kl. 16:30 – 18:00**
Lær at virka ymiskt handaligt.
Fyri børn frá 3. flokki
Undirvísari: Eva G. Joensen

**Tilmeldingin fer fram á heimasíðuni www.vestmanna.fo, frá 05. oktobur 2023 kl. 15:00, til 10. oktobur 2023 kl. 12:00**

Tú fært ein teldupost, tá tilmeldingarfreistin er farin, ið kunnar teg um, um tú ert komin á tað ynskta skeiðið. Fyrivarni verður tikið fyri villum, og verða rættingar lagdar út á heimasíðuna hjá kommununi. Umframt skeiðsgjaldið, skal roknast við útreiðslum til tilfarið, ið nýtt verður.

Skeiðini byrja eftir avtalu við læraran. Øll undirvísing er treytað av nóg stórari undirtøku og góðkenning myndugleikanna.

Luttøkugjaldið er 500 kr. Skúlanæmingar, pensiónistar og styttri skeið gjalda 300 kr.